

# BJARGAÐI AMERIKA OG BØTTI VIÐ LÍVINUM

TANN **4. MARS** Í ÁR ERU LIÐIN **150** ÁR, SÍÐAN **ABRAHAM LINCOLN** VARÐ SVORIN Í EIÐ SUM **FORSETI Í USA**. HANN VAR FORSETI TIL **14. APRÍL Í 1865**, TÁ HANN VARÐ **SKOTIN** Í EINUM **SJÓNLEIKARAHÚSI**. LINCOLN VAR ÍMÓTI **TRÆLAHALDINUM** Í SUÐURSTATUNUM, OG TÁ HANN HEVÐI **VUNNIÐ** FORSETAVALIÐ Í **1860**, LOYSTU FLEIRI **SUÐURSTATIR** FRÁ RESTINI AV **USA**, OG **BORGARAKRÍGGJ** BRAST Á. **NORÐURSTATIRNIR** VUNNU BLÓÐUGA **KRÍGGIÐ**, OG **LINCOLN** FEKK **ÆRUNA** AV AT HAVA **SAVNAÐ** USA Í LANDSINS **SVÁRASTU** ROYNDARSTUND



**SØGA**
**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Tosa amerikanarar um stórar forsetar, nevna teir ofta George Washington, ið var fyrsti forsetin í USA, Franklin D. Roosevelt, sum stýrdi USA gjøgnum stóru búskaparkreppuna í 1930'unum, og so Abraham Lincoln, ið var forseti frá 1861 til 1865. Mong meta Lincoln sum tann mætasta forsetan av øllum, tí tann avbjóðing, hann hevði í síni forsetatíð, kundi ikki samanberast við avbjóðingarnar hjá nøkrum øðrum forseta. USA syndraðist í 1861 í tvey samveldisríkir, United States of America og Confederate States of America, og leingi var líkt til, at sundurbýtingin fór at gerast varandi.

Miðdepil í stríðnum millum norður og suður vóru mongu trælirnir í suðurstatunum, ið upprunaliga vóru komnir úr Afrika. Suðurstatirnir hildu seg hava fullan rætt til at hava trælir, og retorikkurin um teir var so rasistiskur, at í dag høvdu fólk gapað av undran um so niðrandi útsagnir. Sonevndir hugsjónarmenn søgdu, at svørt fólk vóru undirmenniskju, og at hetta kundi ávísast lívfrøðiliga. Suðurstatsfólk ivaðust heldur ikki í, at trælirnir ætlaðu at gera uppreistur, loypa á viðkvæmar hvítar kvinnur og taka breyðið úr munninum á hvíta fólkinum.

Í 1860 vóru fýra milliónir afroamerikanarar í suðurstatunum, og 3,8 milliónir vóru trælir. Tey hvítu vóru átta milliónir í tali. Í norðurstatunum búðu 18 milliónir fólk, harav bara 250.000 vóru afroamerikanarar. Spurningurin um trælahald hevði leingi verið eitt stríðsmál í landinum. George Washington hevði trælir sum so mong, men segði longu í 1770'unum, at trælahaldið skuldi verið avtikið. Hann segði hetta bara ikki so hart, tí hann vildi ikki syndra tjóðina, sum í 1776 hevði tikið loysing frá Onglandi. Í 1820'unum tók trælahaldið so rættiliga dik á seg. Afroamerikanarar vóru hildnir at vera sorgleys børn, sum ikki kundu ráða sær sjálvum, og tí dugdu teir ikki annað enn at vera trælir, hildu mong.

## Loysa frá USA

Abraham Lincoln, ið varð føddur í eini træsmáttu í 1809 í Kentucky, var ímóti trælahaldi. Undir einum valdysti í 1858 høvdu suðurstatsfólk ført fram, at trælirnir í roynd og veru vildu vera trælir, so teir kundu hava arbeiði og fáa ein góðan aldurdóm hjá teimum hvítu. Lincoln svaraði tá turrisliga, at hann hevði ongantíð hoyrt um ein træl, ið var vorðin trælur av fríum vilja fyri at fáa fyrimunir av ófrælsi. Munur var á, hvussu trælirnir vórðu viðfarnir. Summir vórðu viðfarnir sámiliga. Men nógvir vórðu pískaðir, búðu í vánaligum smáttum og fingu ringan mat og gjørdust tí ofta sjúkir.

Á sumri í 1860 útnevndu republikanararnir á floksfundi í Chicago Abraham Lincoln sum teirra forsetavalevni. Hann varð valdur sum semjuloysn millum tveir aðrar. Í suðurstatunum vistu fólk lítið og onki um sjálvlærda sakføraran úr Kentucky. Hetta gav mótstøðumonnum hansara høvi til at uppfinna alskyns ósannar ræðusøgur um, hvat hann veruliga ætlaði, um hann gjørdist forseti. Lincoln fór at sleppa øllum trælum leysum í stundini, varð sagt. Hetta vildu suðurstatirnir ikki, og tá Lincoln hevði vunnið forsetavalið, gjørdu fleiri statir har suðuri ikki meira mætari enn at taka loysing frá USA.

Teir fyrstu statirnir, ið loystu, vóru South Carolina, Mississippi, Alabama, Georgia, Florida, Lousiana og Texas. Teir stovnaðu í februar 1861 samveldið Confederate States of America, CSA. Síðan komu eisini Arkansas, North Carolina, Tennessee og Virginia uppí. Nýggja samveldið fekk sær egnan forseta, Jefferson Davis, og fór eisini undir at skipa sær egnan her. Hvørki sunnanfyri ella norðanfyri ímyndaði nakar sær kortini, at kríggj skuldi bresta á, og suðurstatirnir vóru fullvísir í, at norðurstatirnir fyrsta dagin fóru at viðurkenna sjálvstøðuna hjá CSA.

Men teir fóru skeivir, og teir undirmettu fullkomiliga viljastyrkina hjá Abraham Lincoln, ið var vanur at stríðast hart fyri síni søk. Norðurstatirnir hildu í fyrstani, at suðurstatirnir bara lótu sum um, at teir loystu, so teir kundu sleppa at hava sínar trælir í friði. Teir høvdu fyrr hótt við at fara úr USA. Men ein mánað eftir, at Lincoln hevði tikið við forsetasessinum, í apríl 1861, fóru suðurstatsmenn at skjóta eftir Fort Sumter hjá samveldisherinum, og Lincoln kunngjørdi, at uppreistur var í landinum. Hann sendi boð eftir 75.000 monnum at basa ófriðinum, og fleiri bardagar brustu á.

## Røðan í Gettysburg

Erling Bjøl skrivar í bókini »USA's historie,« at tað var lagnunnar speisemi, at teir bestu herovastirnir í krígnum bardust við suðurstatunum fyri eini skitnari sak, meðan Abraham Lincoln, ið vildi avtaka trælahaldið og savna USA, mátti finna seg í, at flestu herovastarnir hjá norðurstatunum vóru fullkomiliga ódugnaligir. Hvørja ferð teir ikki loystu sína uppgávu á nøktandi hátt, sendi Lincoln teir til hús, og ikki fyrr enn hann gav Ulysses S. Grant ábyrgdina av herinum hjá norðurstatunum í 1864, kom skil í. Í fleiri bardøgum stríddist hann við besta herovastan hjá suðurstatunum, Robert E. Lee, sum hann at enda vann á.

Ein tann kendasti bardagin í amerikanska borgarakrígnum var bardagin við Gettysburg á sumri í 1863, har norðurstatirnir vunnu. Hesin bardagin verður ofta mettur at vera bardagin, ið vendi krígnum til fyrimunar fyri norðurstatirnar. Tilsamans 46.000 mans fullu í bardaganum. Líkini í

KELDUR: USA'S HISTORIE, ERLING BJØL, WIKIPEDIA O.A.